www.ns.fo

*Vit søkja*

# fleiri starvsfólk, ið veruliga flyta mørk, til Vinnudeildina

*Sum vinnukundaráðgevi gerst tú ein týðandi partur av einum nýggjum og øðrvísi peningastovnskonsepti, har stórur dentur er lagdur á, at kundar okkara fáa eina góða, jaliga og professionella uppliving, hvørja ferð vitjað verður í sparikassanum. Ljóðar hetta áhugavert og spennandi? Og hevur tú kunnleika, arbeiðsroyndir ella hóskandi útbúgving á økinum, ert tú kanska júst ein av okkara nýggju vinnukundaráðgevum. Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum peningastovni í støðugari menning, við flatari skipan og óbundnari samskipan, har tú í stóran mun hevur møguleika fyri at seta dám á tín arbeiðsdag. Har tú kemur at arbeiða saman við dugnaligum, virkisfýsnum og málrættaðum starvsfeløgum, ið dagliga flyta mørk, og soleiðis eru við til at skapa framburð.*

***Løn og setanarviðurskiftir***

*Eftir nærri avtalu, samsvarandi útbúgving og royndum umsøkjarans.*

***Umsókn***

*Umsókn saman við CV og prógvum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. august 2006 og skal sendast til: Norðoya Sparikassa, Starvsfólkadeildin, postboks 149, FO-700 Klaksvík, Føroyar.*

***Spurningar***

*Hevur tú eitthvørt at spyrja um viðvíkjandi starvinum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við:*
*Eyðun Kjølbro, undirstjóra, tel. 475055 , t-postur: eydunk@ns.fo*
*ella Marner Mortensen, varastjóra, tel 475070 , t-postur: marner@ns.fo*



*Spyr bara – vit leiðbeina fegin!*

*Gerandisdagurin, og í heila tikið tíðin vit liva í, er merkt av støðugt stórum broytingum. Og hetta er eisini galdandi fyri fíggjarheimin. Fyri Norðoya Sparikassi er 2006 eitt serliga spennandi ár við nýggjum deildum í Saltangará og Tórshavn – og nógv tíð og orka er løgd í at menna eitt nýtt konsept, har tað at støkka inn á gólvið í Norðoya Sparikassa, gerst ein góð uppliving við høgum tænastustøði og góðari ráðgeving. Og ein hin mest týðandi táttur í einhvørjum slógbrótandi virksemi eru starvsfólkini! Er hetta nakað fyri teg, ert tú jaligur av lyndi, hevur góð samstarvsevni, humor, lætt við at tosa og samskifta við fólk, gott sjálvsálit, eins og tær dámar at arbeiða sjálvstøðugt og við støðugt nýggjum avbjóðingum, er Norðoya Sparikassi kanska júst arbeiðsplássið fyri teg...*

Norðoya Sparikassi Ósavegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík
Tel. 475000 Fax 476000 ns@ns.fo

Klaksvíkar Kommuna / Sosiala Deild



# Sosialráðgevi

**Sosialráðgevari til barnaverndartænastuna í Norðoyggjum**
Í samband við at ein av okkara sosialráðgevum ferð úr starvi, er eitt starv á Sosialu Deild í Klaksvík leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.
Á Sosialu deild starvast, umframt leiðarin, tveir sosialráðgevar, ein barna - ansingarsamskipari/ stuðulsráðgevi, ein dagrøktarleiðari og eitt skrivstovufólk.

**Starvið:**
Tú kemur, í tøttum samstarvi við sosialdeildarleiðaran og starvsfólk á deildini, at taka tær av einum spennandi og fjøltáttaðum øki við málsviðgerð, ráðgeving og øðrum uppgávum sum Barnaverndarumsitingin tekur sær av.

**Arbeiðsuppgávan umfatar m.a.:**
- at fyrireika mál til nevndarviðgerð
- at ráðgeva og vegleiða barna- og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- at ráðgeva barnaverdarnevndini í barnaverndarlógini
- at seta í verk og fylgja upp fyriskipanir
- at virka sum samskipari í málum har fleiri myndugleikar eru við
- at samstarva tvørfakliga
- at arbeiða fyribyrgjandi í samstarvi við fakpersónar og stovnar á barna- og ungdómsøkinum

**Vit leita eftir starvsfelag, ið:**
- Er útbúgvin sosialráðgevi
- Hevur royndir sum málsviðgeri ella aðrar viðkommandi royndir
- Hevur áhuga og evnir at arbeiða við barna og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- Megnar at vera nágreiniligur og samstundis hava nógvar bóltar í luftini
- Megnar at seta seg inn í støðuna hjá familjum, og hjálpa teimun út frá hesum
- Hevur gott yvirlit og dugir væl at orða seg

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum
- Góðar samstarvsfelagar
- Supervisión

**Setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

Meira fæst at vita við at venda sær til Jancy Biskopstø Klein sosialdeildarleiðara á telefon 41 00 00.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi í seinasta lagi **18. august. 2006**

**Klaksvíkar Kommuna**
**Postboks 2**
**700 Klaksvík**

creδ 458006

**Stutt um Barnaverndutænastuna í Norðoyggjum:**
Barnaverndartænastan í Norðoyggjum fevnir um Svínoyar, Fugloyar, Kunoyar og Klaksvíkar kommunu.
Umsitingarliga er barnaverndartænastan ein eind undir Sosialu deild í Klaksvíkar kommunu.
Uppgávan hjá barnaverndartænastuni er at tryggja børninum, ið liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, neyðuga hjálp og umsorgan.

Klaksvíkar Kommuna I Nólsoyar Pálsgøta 32 I FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 I Fax. 410001 I klaksvik@klaksvik.fo I www.klaksvik.fo

Sosialurin
Sosialurin i